# NN BROYTA ALT



** Eg fór tá eftir øllum húsunum, og kundi við sorg ásanna, at í hasum húsunum búði eingin; í teimum næstu ein gamal drongur; í tí triðja ein gomul kona; tað fjórða húsið stóð tómt og so framvegis**

## AFTURGONGD

*- Tað er harmiligt at síggja, at Svínoy er so nógv minkað. Men her eru møguleikar fyri at hon kann menna seg aftur, sigur Atli Jacobsen, sum hevur búð á Eiði síðani 1978. Mikudagin vitjaði hann aftur í heimbygdini*

## 4,5 tunnil

Sambært einum yvirliti hjá Landsverki eru 4 tunlar í Kalsoynni.
- Teir vóru hepnir og fingu eisini ein hálvan tunnil til seyð og eina ferjulegu.
- Fingu vit bara EIN tunnil úr bygdini og Yvir í Havn, so var framtíðin hjá Svínoy bjargað, staðfestir Atli Jacobsen.
Møguleikar eru eisini fyri at gera ein minst 1800 metrar langan flogvøll og fyri at fólk kunnu fáa grundøki at byggja sethús á.

## Bygt bát

Mikudagin í farnu viku legði Atli Jacobsen enn einaferð leiðina til Svínoyar. Hesaferð var tað fyri at hjálpa til arbeiðinum at rigga nýggju smoltstøðina í bygdini til.
- Man kann altíð geva eina hjálpandi hond, nú sonurin eisini arbeiðir her, sigur hann.
Atli er fittur í hondunum, og hevur bygt sær summarhús í Svínoy og ein bát, sum enn ikki er flotaður.
- Báturin stendur fiks og ferdigur í garasjuni á Eiði, men eg havi ikki tímað at flota hann í vetur. Tað verður einaferð út ímóti vári, sigur Atli.